LM-137/2020

Fylgiskjal 6

VAÐHORN
EST. 1973

Strendur 31.mars

Fiskimálaráðið

Yvuri við Strond 15

100 Tórshavn

Hoyringsskriv í samband mál nr 21/00117-3, um loyvi at avreiða 15% av botnfiski uttanlands.

Vaðhorn Seafood vil við hesum hoyringsskrivi harðliga mótmæla at botnfiskur kann avreiðast uttanlanda.

Virðisøking í Føroyum er ofta nevnt av samgonguni, ja orðið virðisøking og bústaðarneyðin blivu nevnd av Føroya Løgmanni sum aðalmál í fjør-heyst fyri komandi árið.

At man nú fer beinleiðis í móti virðisøking í Føroyum er óskiljandi, við at loyva avreiðingar av tí føroyska tilfeinginum uttanlanda. Um háttvirda løgtingið meinar nakað við orðið virðisøking, so lat allan botnfisk bliva landaðan í Føroyum, soleiðis at so nógv sum gjørligt blívur virðisøkt í Føroyum, øllum føroyingum at gagni.

Vinarliga

Jógvan Gregersen, stjóri